


## Portalurin setir nýtt met

Í síðstu viku setti portalurin www.olivant.fo nýtt met við mest sýndum síðum. 46.951 brúkarar sýndu heilar 3.218.787 síður í viku 31, sum fevndi um ólavsøkuna, og er hetta nýtt met fyri føroyskar heimasíður. Hetta kann merkja, at fólk hava fylgt væl við ólavsøkuni og Pál Joensen, sum eisni svam seg til meistaraheitini í viku 31. Samstundis hevði www.sportal.fo eisini rættiliga nógvar brúkarar, nevnliga 18.918, og hevur hetta helst eisini samband við bragdini hjá Pál Joensen í Beograd, sum rættiliga nógv fólk hava fylgt við.

# Bill bjartskygdur

**Meðan Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er í iva um, hvussu útspælið frá Sjálvstýrisflokkinum skal tulkast, er Bill Justinussen úr Miðflokkinum meira bjartskygdur um møguleikan fyri samstarvi við Sjálvstýrisflokkin**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldi sendi landsnevndin hjá Sjálvstýrisflokkinum út tíðindaskriv, har landsnevndin gevur tingmanninginí fullan stuðul í royndini at tryggja flokkinum ávirkan við breiðum samstarvi á tingi, samstundis sum hon mælti frá at Sjálvstýrisflokkurin fer uppí samgonguna, og at Sjálvstýrisflokkurin gerst stuðulsflokkur hjá samgonguni. Harafturat segði hon, at Sjálvstýrisflokkurin leggur dent á at arbeiðsfriður aftur fæst á Føroya Løgtingi, og hon mælir tingbólkinum til at taka upp samráðingar um at loysa átrokandi mál.

Ymiskt er, hvussu partarnir í samgonguni tulka hetta útspælið, og meðan samgonguleiðarin, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er meira skeptiskur, er Bill Justinussen úr Miðflokkinum meira bjartskygdur, og sær møguleikar fyri samstarvi í hesum útspælinum.

### Møguleiki fyri konstruktivum samstarvi

Talan verður neyvan um nýggjar samgongusamráðingar, og eitt møguligt samstarv við Sjálvstýrisflokkin kemur at taka støði í samgonguskjalinum og teimum málum, sum standa í har. Men ætlanin verður so at hava eitt tætt samstarv við Sjálvstýrisflokkin, so at hann verður við til at lyfta tey mál, sum hann er samdur við samgonguna í, og at flokkurin harvið eisini fær ávirkan á øll tey málini, ið verða løgd fram.

- Politikkur er um at loysa trupul mál og at semja seg fram til loysnir. Landið hevur brúk fyri tryggum politiskum viðurskiftum, serliga við atliti til tær avbjóðingar, ið eru fyri framman. Eg síggi tí ein møguleika fyri einum konstruktivum samstarvi við Sjálvstýriflokkin, sigur Bill Justinussen, løgtingsmaður, um útspælið frá Sjálvstýrisflokkinum.

### Ov tíðliga at tosa um annað samstarv

Um samráðingarnar við Sjálvstýrisflokkin ikki bera á mál, er støðan ein heilt onnur. Men enn er ov tíðliga at tosa um nakað samstarv við hinar báðar stóru andstøðuflokkarnar, sigur Bill Justinussen.

- Um hetta ikki ber á mál, so mugu vit handla út frá teirri støðuni, sum er tá. Tá verður talan um eina nýggja støðu, sum fyrst má viðgerast innanfloka, og síðan eisini í samgonguni.

Enn er tað bara Fólkaflokkurin, sum greitt hevur meldað út, at teir vilja hava løgmann at leggja frá sær, og sambært Bill Justinussen, hevur Sambandsflokkurin víst konstruktivan vilja til at loysa trupul mál. Tí er tað møguligt, at Sambandsflokkurin er jaligur fyri einum møguligum samstarvi.

- Men enn er ov tíðliga at siga nakað um samstarv við teir báðar stóru andstøðuflokkarnar. Fyrst mugu vit fáa at síggja, hvussu langt samráðingarnar við Sjálvstýrisflokkin bera. Tað er ein øgiliga sterkur vilji í samgonguni fyri at náa teimum málum, vit hava sett okkum fyri. Henda samgonga hevur brotið upp av nýggjum og vit hava sett okkum høg mál. Tí er tað sera umráðandi, at vit aftur fáa trygg politisk viðurskifti í landinum, sigur Bill Justinussen.

### Miðflokkurin samdur um politikkin

Nú innanhýsis stríðið í Javnaðarflokkinum og kanska eisini í Tjóðveldi hevur merkt politiska landslagið seinastu vikurnar, hevur ikki verið serliga nógv at hoyrt til Miðflokkin. Men sambært Bill Justinussen, er Miðflokkurin hóast alt sera virkin.



*- Eg síggi møguleikan fyri einum konstruktivum samstarvi við Sjálvstýrisflokkin, sigur Bill Justinussen úr Miðflokkinum*

- Miðflokkurin er ein sera homogenur flokkur, og vit hava ongar innanfloks trupulleikar at dragast við. Men vit fylgja støðuni alla tíðina, og hava verið virknir á tann hátt, at vit royna at sameina tey ymisku sjónarmiðini. Miðflokkurin er samdur um politikkin og málini hjá landsstýrinum, og stendur fult aftanfyri tann politikkin, ið hevur verið førdur higartil, sigur Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, at enda.

# Sjálvstýrið jaliga útmelding

**Torbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldinum, heldur útmeldingina frá Sjálvstýrisflokkinum í gjárkvøldið um óbindandi samstarv við sitandi samgongu vera jaliga.**

POLITIKKUR
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Um hálvgum ellivu tíðina í gjárkvøldið boðaði Sjálvstýrisflokkurin frá, at flokkurin fer ikki inn í bindandi politiskt samstarv við sitandi samgongu, orsakað av at fólkið hevur mist álit á henni. Flokkurin vil hinvegin fara inn og samstarva um breiðar politiskar semjur.

Torbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldi, heldur hetta vera ein jalig útmelding frá Sjálvstýrisflokkinum.

### Sjálvstýrið skal ávirka

- Valskráin hjá Sjálvstýrisflokkinum líkist so mikið nógv samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu, at tað burdi ikki verið nakur trupulleiki, sigur Torbjørn Jacobsen. Næstformaður í Tjóðveldi tulkar tíðindaskrivið hjá Sjálvstýrisflokkinum soleiðis, at flokkurin ikki velur at fella samgonguna, men at teir væntandi vilja hava ávirkan á átrokandi mál so sum fíggjarlógina fyri 2009. Torbjørn Jacobsen útihýsir heldur ikki møguleikan fyri, at Sjálvstýrisflokkurin kann gerast skipaður partur av sitandi samgongu.

### Eingin avgerð tikin

Fer sitandi samgonga at halda fram sum minnilutastjórn við stuðli frá Sjálvstýrisflokkinum?

- Hetta er ikki ein spurningur, eg fái svarað, sigur næstformaðurin. Hann sigur, at Løgmaður fer at taka avgerð um hetta málið, ið enn ikki er avgreitt.

- Sum øll vita, ligga vit í einum ongamannalandi, har mann roynir at fáa alt at hanga saman, so fólki kann kenna seg trygt.

### Gott samstarv

Fær Sjálvstýrið ikki ov góð kort at spæla við, um samgongan heldur fram sum minnilutasamgongu uttan fast samstarv?

- Tað samstarvið kemur at byggja á tann veruleikan, at teir ikki fella stjórnina, og tað álitið kanst tú bara byggja politiskt samstarv á, sigur Torbjørn Jacobsen, næstformaður í Tjóðveldi.

- Reint politiskt haldi eg, at hesir báðir partarnir, sjálvstýrisflokkurin og samgongan, ikki átti at hava so stórar trupulleikar í einum samstarvi, sigur hann.

### Sandoyartunnilin farin á bláman

Er endamálið við einum slíkum samstarvi at tryggja, at Páll á Reynatúgvu missir ávirkan?

- Tað er als ikki tað, hett málið snýr seg um í løtuni, sigur næstformaður Tjóðveldisins.

- Í løtuni snýr málið seg um, at ein stjórn roynir at finna sær ein meiriluta so, at hon fær rikið tann politikkin, hon vil, sigur hann, og er meiriluti ikki fyri einum máli, so er vælsagtanst bara eitt at gera, og tað er at leggja málið frá sær, tí bara at sita fyri at sita, kann ikki hava áhuga fyri nakran. Sandoyartunnilin er ikki tað politiska málið, ið er hægst á breddanum í løtuni.

### Gerhard eigur skyldina

- Støðan viðvíkjandi sandoyartunnilin er, at Gerhard Lognberg við sínum politiska atburði hevur skotið tunnilin til Sandoyar út í rúmdina, sigur Torbjørn Jacobsen.

- Nú er spurningurin, hvussu ein nýggjur politiskur meiriluti kann fáa sandoyartunnilin á bredda aftur, har Gerhard gjørdi enda á.